# Føroyskt neytakjøt og asiatiskt kryddarí á Ólavsøku

**Upp undir Ólavsøkuna er altíð nógv stákan av ymiskum slag. Nógvur matur verður gjørdur og oftast verður okkurt serligt gjørt burturúr. Í ár fær ein møguleika at keypa sær asiatiskar smárættir í Niels Finsens Gøtu, men kjøtið er føroyskt**

ÓLAVSØKA
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Torfinnur Dalsgarð slaktaði fyri nøkrum døgum síðan eitt neyt til eina heldur forkunnuga fyritøku – asiatiskar rættir. Tað er Grækaris Magnussen, sum hevur bílagt. Í nakrar dagar hevur kjøtið hingið í kølirúmi og í løtuni eru Grækaris í ferð við at skera kjøtið í bitarnar, sum skulu kryddast við asiatiskum kryddaríum. Grækaris fer at selja asiatiskar rættir í lítla handlinum yvir av Auto, sum eitur Bjalla – Krydd & Krás.

Torfinnur Dalsgarð hevur 24 mjólkineyt og 50 neyt tilsamans í fjós–inum úti í Havnadali. Tað eru nøkur, sum brúka hendan møguleikan at keypa kjøt í staðin fyri at keypa frá teimum vanligu matvøruhandlunum.

– Tað er serliga út á heyst–ið, at fólk bíleggja sær kjøt at koyra í frystiboksir. So tað gongur væl við tí. Dygdin er góð, betri í mun til tað innflutta kjøtið.

Kjøtið hevur hingið í nakrar dagar nú og eftir slaktið hevur Poul Muller tikið sær av grovskeringini. Og síðan er Grækaris Magnussen sloppin framat at skera í bitar og annað sum skal brúkast til sjálvu matgerðina. Í kvøld og í morgin skal kjøtið kryddast og Grækaris vó–nar, at hann kann bjóða kundum asiatiskar rættir mikukvøldið, og um ikki hetta eydnast, so hósdagin.

Kryddaríið, sum verður brúkt til hesar rættirnar er upprunavøra og kemur beinleiðis úr Asia, úr India, Teiland, Kina og Vietnam - og er ikki blandingsvøra aðrastaðni frá. Grækaris fortelur, at hetta er ikki tað sama sum ein fær í matvøruhandlum annars. – Nei, hesar vørurnar sum vit innflyta eru væl betri enn, tað, sum ein fær aðrastaðni. T.d. eru rísini 100% jasmin-rís og ikki blandings-vøru, sigur Grækaris.

Eftir fínskeringina av kjøtinum fer hann í gongd við at krydda kjøtið, soleiðis at Ólavsøkugestir fáa møguleika at keypa sær hesar forkunnugu rættir, sum eru: Orientalsk karry-rættur við kalkunkjøtið. Paprika-rættur við føroysk–um neytakjøti, og so ein meksikanskur chilli con carne-rættur eisini við føroyskum neytakjøti. Til allar rættirnar verður jas–min-rísi serverað. Til chilli con carni verður hakkikjøt av føroyskum neytakjøtið brúkt. Grækaris fortelur, at tað ikki er umstøður at gera meiri burturúr enn tríggjar rættir. – Vit høvdu hugsað okkum kanska at víst, hvussu ein gjørdi rættirnar, men tað fer helst at vera ov trongligt nú á Ólavsøku.



*Grækaris skerir feitt burtur*

*Poul Müller, bóndi, og Grækaris Magnussen við neytakjøtinum*





Á Almannastovuni arbeiða umleið 100 fólk, harav 7 starvast á Arbeiðsmarknaðar-deildini í løtuni.

Almannastovan søkir
sosialráðgevar

Hevur tú hug at royna teg í einum spennandi arbeiðsumhvørvi í støðugari menning við nógvum avbjóðingum? Søkt verður eftir sosialráðgevum til Arbeiðsmarknaðardeildina á Almannastovuni vegna uppnormering av deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara, á tlf. 353570 ella við at fara inn á heimasíðu okkara: www.almannastovan.fo ella á www.portal.fo. Umsóknarfreistin er 14. aug. 2006 kl. 12.00

almannastovan
www.almannastovan.fo

Tíðindaskriv

## Silvaland til børnini

**Á Summar–festivalinum verður eitt Silvaland til børnini, har gyklarar, klovnar, Trøllapætur og omman, festivaldjór, geitalomb og Silvi koma á vitjan**

SUMMARFESTIVALUR

Nógv spennandi og stutt–ligt verður á skránni til teir yngstu gestirnar á Summarfestivalinum. Í samstarvi við Norðoya Sparikassa verður eitt stórt Silvaland sett upp á økinum við Akursmørk í Klaksvík, har børnini fáa høvi at síggja Silva, gyklarar, Trøl–lapætur og ommuna og mong onnur. Eisini verður møguleiki at klatra, reiggja, skreiða og hoppa.

Silvalandið kemur at standa beint yvir av Vágs–bøi, har stóri pallurin er, so børnini kunnu stuttleika sær, meðan tey vaksnu njóta tónleikin.

Børnini fara at uppliva livandi bamsur, sum spæla tónleik og Poppkorn og Dropar koma somuleiðis at syngja og spæla. Har verður ein yvirvaksin gorilla handan klaverið, ein gul bamsa spælir upp á bass, ein haruvinur hjá Silva spælir trummur og ein høsnarungi syngur.

Harafturat verða eisini geitarlomb á økinum, sum børnini fáa loyvi til at kela og klappa.

Ein serlig plakat er gjørd í sambandi við tiltakið, sum Edward Fuglø, listamaður, hevur gjørt. Plakatin er gjørd við íblástri frá gomlu sirkusplakatunum við klovnum uppi í hornunum og annars myndir av øllum teimum serligu gestunum og tilboðunum, ið verða í Silvalandinum.

- Ætlanin var at gera eina plakat, sum bæði er summarslig og festlig, sigur Edward Fuglø.

Øll børn, ið kundu hugsað sær at átt eina tílíka plakat, kunnu støkka inn á gólvið í Norðoya Sparikassa og fáa hana ókeypis.

*Listamaðurin, Edward Fuglø, hevur gjørt serligu plakatina til Silvalandið á Summarfestivalinum*

